Erhard Joensen
Eyðdis Hartmann Niclasen
Bárður á Steig Nielsen
Magnus Rasmussen
Helgi Abrahamsen
Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 93/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu (Broytingar í tøkugjaldinum)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Skjal 2, sbr. skjal 1 verður orðað soleiðis:

"**Skjal 2**

Tøkugjaldsstigin, ið vísir, hvussu gjaldið er treytað av marknaðarprísinum

Gjaldið verður ásett soleiðis:

P = miðal altjóða marknaðarprísur í DKK pr. kg.

K = miðal framleiðslukostnaður í DKK pr. kg.

- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er gjaldið 5,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., men minni enn K pluss 20 kr., er gjaldið 7,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 20 kr., men minni enn K pluss 30 kr., er gjaldið 10,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 30 kr., men minni enn K pluss 40 kr., er gjaldið 12,5%.

– Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 40 kr., er gjaldið 15,0%.

Talva 1

Prísur	**Gjald**
P<K	0,5%
K ≤ P < K+5	2,5%
K+5 ≤ P < K+15	5,0%
K+15 ≤ P < K+20	7,5%
K+20 ≤ P < K+30	10,0%
K+30 ≤ P < K+40	12,5%
P≥K+40	15,0%

”

Viðmerkingar
Hetta broytingaruppskoti er ein roynd at finna eina semju ímillum hetta lógaruppskoti og løgtingsmál nr. 73/2022 frá tinglimunum í Sambandsflokkinum um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu.

Broytingaruppskoti hevur 7 trin, har tey fyrstu 4 trinini eru júst tey somu í báðum uppskotunum, t.v.s upp til at altjóða marknaðarprísurin er 20 kr./kg hægri enn framleiðslukostnaðurin.

Tey síðstu 3 trinini eru ein “millumloysn”, tá altjóða marknaðarprísurin er ímillum 20 kr./kg og 40 kr./kg hægri enn framleiðslukostnaðurin, við einum mesta gjaldi uppá 15% tá prísurin blívur 40 kr./kg hægri enn framleiðslukostnaðurin.

Á Løgtingi, 17. mai 2022

Erhard Joensen Eyðdis Hartmann Niclasen Bárður á Steig Nielsen

Magnus Rasmussen Helgi Abrahamsen Kaj Leo Holm Johannesen

Johan Dahl